# num og gysari á Luzhniki



Leikvøllin.

## Sangur í Metroini

Moskva hevur eina gott og væl líka væl fungerandi metro, sum Keypmannahavn og London. Vit endaðu í einum metrovagni, sum var stúvstappaður við United-viðhaldsfólkum, sum sungu gallarnar úr sær. Meðan vit koyra ímóti Luzniki Leikvøllinum ringja Jákup Mørk og Jón Brian Hvidtfeldt frá Rás2, men hvat teir og lurtarnir hoyrdu frá mær, sum var kvaldur av "Viva Ronaldo" og øðrum United-slagsangum veit eg ikki? Komnir út úr metro-vagninum standa vit í komuhøllini, sum hevði ein rúmklang av tí aðru verð. Sum vit ganga ímóti rullutrappuni gjellir "Viva Ronaldo" við so nógvari fyllu, at sjálvt Liverpool og Arsenal-viðhaldsmennirnir í ferðalagnum mugu boyggja seg fyri fantastiska og fanatiska stuðlunum hjá teimum reyðu. Komnir upp rullutrappirnar ganga vit ímóti Olympiska Leikvøllinum, nú best kendur sum Luzhniki Leikvøllurin. Ávegis til okkara seksjón, nevnd "C-3" skulu vit gjøgnum fleiri trygdarinstansir.

*Føroyingar uttanfyri Luzhniki leikvøllin. Frá vinstru: Poul Helgi Jacobsen, Beinir Poulsen, Eli Christiansen, Atli Leo, Heri Simonsen, Gunleiv Rasmussen, Børge Christiansen og Flóvin Jespersen við sergjørda merkinum uttanfyri Luzniki Leikvøllin*

*Mynd: Ivan Eginson*

Russiska løgreglan vil ikki, at nakað óreglimenterað skal henda. Komnir heilt nær leikvøllinum standa teir mest fanatisku bláu og reyðu viðhaldsmennirnir og rópa idiotisk ókvæmisorð eftir hvørjum øðrum, men tann stóri meirilutin vísir sámiligheit og virðing. Kortini syrgdu russisku myndugleikarnir fyri, at tey skrásettu Chelsea- og United viðhaldsfólkini komu við hvør sínum flogførum, sum lendu á ymiskum flogvallum, og sum búðu á ymiskum gistingarhúsum. Á Luzhniki leikvøllinum sótu tey skrásettu reyðu og bláu viðhaldsfólkini í hvør sínum enda av vøllinum. Vit føroyingarnir høvdu atgongumerkið til ta uttanveltaðu seksjónina. Vit taka aftur nakrar myndir við flagginum uttanfyri leikvøllin, og aftur eru tað fleiri, sum vilja hava mynd av okkum og flagginum!

## Dystur yvir 2 dagar

Leikvøllurin var ein listafrøðilig opinbering. Og framsýningarshowið, sum var áðrenn dystin man verða tað vakrasta, sum er sýnt fram í Moskva síðani olympisku setanina á sama leikvølli í 1980. Chelsea og United-viðhaldsfólkini skaptu ein fantastiskan stemning í hvør sínum enda av vøllinum, og hevði rennibreytin ikki tikið nakað av stemningin og broddinum, so høvdu vit farið av leikvøllinum við syngjandi, dulum oyrum. Tað gjørdist fyrstu ferð í lívinum, at ein fór til ein dyst, sum byrjaði kl. 22.45 um kvøldið. Eitt skjótt roknistykkið segði okkum, at dysturin fór at verða spældur yvir tveir dagar! 21. mai – also í 1. hálvleiki - var United betri, teir høvdu fleiri málmøguleikar, og



*Ein avgerandi løta í dystinum. John Terry glíður, tá ið hann skal skjóta sigursmálið fyri Chelsea. Endin er at Chelsea tapir*

var tað misvísandi, at Chelsea slapp at javna út beint áðrenn steðgin. Ronaldo og Frank Lampard skoraðu. 22. mai – í 2. hálvleiki – var Chelsea betri. Samanlagt bleiv talan um nógvar málmøguleikar, har Chelsea hevði skotini á træverkið. 90 minuttir vóru farnir, og øll kundu klappað fyri teimum 22 á vøllinum. 1. hálvleikur í umdystinum var rættuliga góður, men 2. hálvleikur í umdystinum var merktur av møði, krampa og vreiði. Vit upplivdu eina stuttliga løtu, har nærum triðji hvør maður hevði krampað, men vit upplivdu eisini eina rokmikla løtu, har ein frustreraður Drogba hjá Chelsea var vístur av vøllinum. So var farið til brotssparkskapping. Ronaldo, sum annars er ein elegantur spælari, tók aftur nøkur óneyðug fet, og brendi! Teir fyrstu 4 hjá Chelsea skoraðu, og



*Okkara maður á Reyða Torginum*

støðan var 4-3 til Chelsea. Tá ger Michael Ballack hjá Chelsea ein brølara, sum sjónvarpshyggjarnir ikki sóu. Hann lyftir sigurssælur arminum ímóti Chelsea-fjøldini. Nani fer fram. Brennir hann, so hevur Ballack rætt. Hann skorar, støðan er 4-4, men enn kann Ballack fáa rætt. Stríðsmaðurin John Terry skal skjóta fyri Chelsea. Regnváti grasvøllurin, sum er



*Luzhniki leikvøllurin*

innfluttur úr Slovakia er vorðin rættuliga hálur. Hann er lagdur omaná 4. ættarliðsgraslíkisvøllin, sum annars er fasta undirlagið til dystir á Luzhniki Leikvøllinum. Terry glíður, og United er bjargað, fyri fyrst. United tekur føringina 6-5, Nicolas Anelka, sum áður hevur spælt ímóti bæði Føroyum og B36 skal halda Chelsea inni í dystinum, men gamli hollendski revurin í United-málinum, Edwin van der Sar fer rættan veg. Vit 8 føroysku United-viðhaldsmennirnir dansa og fegnast saman við øllum hinum United-viðhaldsfólkunum. Aftanfyri situr ein, sum hevur Bayern München, sum sítt A-lið, og Chelsea sum sítt B-lið. Hann var eisini til finaluna á Nou Camp í Barcelona í 1999, tá United vendi 0-1 til 2-1 ímóti Bayern München í yvirtíðini. Hann hevur eitt sindur ringt við at skilja tað, sum er hent. Talan er nærmast um Deja Vu. Onkur okkara millum er rørdur, og aðrir hálvrørdir. Vit fáa tað ikki størri enn hetta, og vit súgva hvørt sekund av sigursløtuni og steypahandanini til okkum.

## Túsindtals hermenn

Millum teir yvir 20 føroyingarnir, sum sótu saman, óansæð um ein helt við Chelsea, United, ella var uttanveltaður, var breið semja um, at eitt fótbóltsupplivilsi fæst bara ikki størri enn hetta. Ein klípur seg í armin fyri at fata, at ein er staddur til eina so minnisríka løtu. Komnir út úr Stadion-økinum bíðar okkum enn ein forkunnug uppliving. Tað eru fleiri russiskir hermenn og løgreglufólk enn viðhaldsfólk uttanfyri leikvøllin. Herfólkini og løgreglufólkini forma eina langa kolonnu, allan vegin frá leikvøllinum, og nakrar kilometrar til nærmastu metrostøðina. Tey eru bæði til vinstru og høgru, og tað er ikki ein hálvur metur millum tey uniformeraðu fólkini. Ein ótrúliga imponerandi sjón, og hendan minniliga gangitúrin fingu vit eina uppliving av sovjetiskum dimensjónum. Allir – taparar sum vinnarar – høvdu fingið eina heildaruppliving, fyri lívið. Vit fingu ikki høvið at vitja Lenin, men tað verður ein marginal uppliving samanborið við minniligu Champions League-finaluna á Luzniki-leikvøllinum í Moskva. Eg eri lendur fysiskt, men ikki mentalt!